# Jólaskáli í Klaksvík

**Komandi vikuskifti verður Skálin gjørdur um til ein jólaskála, har 12 ymiskir handverkarar og listafólk fara at sýna fram og selja teirra lutir. Tað eru Maria Mørkøre og Guðrun Elttør, sum skipa fyri**

JÓLASKÁLI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Hetta vikuskiftið verður ein jólaframsýning og søla í Skálanum. Har fara 12 listafólk og handverkarar at selja hondgjørdar vørur. Stigtakararnir siga, at hetta er ein roynd at skapa størri umhvørvi rundan um handverk og list í Klaksvík.

– Vit hava tosað um at skipa fyri onkrum tílíkum tiltaki longi, og tá vit so vóru til Gluggaglæmu, sum Føroya Heimavirkisfelag skipar fyri, gav tað okkum eitt skump tann rætta vegin, greiðir Maria Mørkøre frá.

Á framsýningini verður mangt og hvat. Málningar, smykkur, prýðislutir, silvur og horn, tøvdir lutir, bundin pløgg og smíðaðir lutir.

Maria sigur, at tey vita tað ikki fyri vissu, men hon heldur, at virðingin fyri teimum handgjørdu lutunum ikki er so stór.

– Tað vísir seg í øllum førum ofta, at teir handgjørdu lutirnir fara fyri alt ov lítið, og tí hava vit roynt at stilla tað pent upp og harvið møguliga økja um virðingina fyri tí nógva arbeiðinum, sum liggur í at skapa lutirnar, sigur hon.

### Útbyggja seinni

Maria og Guðrun vóna, at hetta kann fara at verða eitt afturvendandi tiltak, sum eisini kann mennast til nakað meira.

– Tað er ikki nakað serligt umhvørvi fyri handverk og list í Klaksvík, men kanska hetta kann vera ein byrjan. Onkunstaðni skal man í øllum førum byrja, heldur hon fyri.

Í jólaskálanum verður eisini ein café, har livandi tónleikur verður at hoyra tvær ferðir um dagin allar tríggjar dagarnar. Tónleikinum koma Randi Sivertsen, næmingar við Helgu Gerðalíð, Steinvør Fonn og Pætur við Keldu, Hanna Jensen og Kristian Hansen at standa fyri.

Sølan letur upp í dag klokkan 16 og er opin til klokkan 22. Tað verður hon eisini hinar báðar dagarnar í vikuskiftinum. Atgongumerki kosta 50 krónur fyri vaksin og 20 krónur fyri børn.



*Hetta vikuskiftið verður jólasøla og framsýning í Skálanum í Klaksvík*





Lívið er ljóst og vakurt. Brádliga hendir tað, og alt broytist.

Onki er so virðismikið sum lívið og ein góð heilsa. Ein vanlukkutrygging tekur hond um tað dýrabarasta, vit eiga.

Hjá børnum fevnir tryggingin eisini um ymiskar barnasjúkur.

Tú kanst tryggja teg alt samdøgrið ella í frítíðini.

Tryggingin kann nýtast aðrastaðni enn í Føroyum. Tú kanst fara út í allan heim við henni.

Velur tú eina vanlukkutrygging, kunnu vit hjálpa tær fíggjarliga. Tryggingin er eitt trygdarnet fyri teg og alla familjuna, og ein íløga í framtíðina.

Ring til okkara á tel 345600 ella far inn á www.trygging.fo og fá nærri at vita, hvussu vit kunnu hjálpa tær.

**Tilboð í desember**

Allan desember mánað hevur Tryggingarfelagið Føroyar eitt tilboð, ið gevur foreldrum møguleika at tekna privata vanlukkutrygging, íroknað barnavanlukkutrygging, har fyrsta ársgjaldið er fyri hálvan prís!

Tí er ikki at bíða, men at tryggja børnini væl, so tey altíð eru "trygg á leiðini", hvar tey so eru og hvat tey so gera – alt samdøgrið!

**Gjaldið bara hálvt gjald fyrsta árið!**

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo


# Talgildur upptakari

Televarpið hevur nú fingið eitt nýtt slag av móttakara.

Nýggja tólið nevnist Force530T, og umframt at taka ímóti teimum 25 rásunum, sum Televarpið hevur at bjóða, er talan samstundis um talgilt upptøkutól.

Nýggi móttakarin hevur nevnliga ein 80 GB stóran harðdisk, og kann hesin goyma upp til 60 tímar av upptøkum.

Umframt at taka upp, ber eisini til at síggja sendingar forskotið. Eitt nú ber til at »pausa« ein film, um tú skalt eitthvørt ørindi, og síðani hyggja at restini forskotið, tá tað aftur slepst framat sjónvarpinum.

**-jm**




# Eina signing um dagin

Signingar hvønn dag er heitið á nýggjari bók, sum Heimamissiónsforlagið hevur givið út. Í bókini eru 365 fittar smásøgur, sum eru ætlaðar at lesa fyri yngstu børnunum. Bókin er uppbygd soleiðis, at eitt bíbliuorð er til hvønn dagin í árinum, og síðani er ein stutt søga saman við tekning knýtt at hesum orði.

Tað er Carla Branhill, ið hevur skrivað bókina. Simona Johannesen hevur týtt til føroyskt.

**-jm**